VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Skrið ella stormur av útnyrðingi, um kvøldið minkar hann vindin niður í ein strúk. Ælingur, sum frálíður vátakavi, og hitin kemur niður millum 2 og 5 stig.



Veðrið leygardagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, seinnapartin minkar hann vindin. Fyrrapartin kavaælingur, annars turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.



Veðrið sunnudagin:
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt, men seinnapartin regn. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og norði og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.

Nýggj tøkni avmarkar ferðina

Hósdagin var tíðindafundur á Ferðslurtrygd Yviri við Strond í Havn, har høvi var at royna ISA (Intellegent Speed Adaption) ferðavmarkaran í bilinum hjá Ferðslutrygd

FERÐSLUTRYGD
Magnus Gunnarsson

Í sambandi við at ISA útgerðin, sum er sett í bilin hjá Ferðslutrygd, alment verður tikin í brúk, varð skipað fyri tíðindafundi í hølunum hjá Ferðslutrygd Yviri við Strond hósmorgunin. Á fundinum varð greitt frá um ISA-skipanina, og høvi var at royna bilin.

ISA stendur fyri Intellegent Speed Adaption og virkar á tann hátt, at um koyrt verður skjótari enn fyriskrivað í einum ávísum øki, so gerst spitarin tyngri at trýsta á. Á henda hátt verður bilførarin alla tíðina mintur á ikki at koyra ov skjótt.

Á fundinum greiddi Búgvi Apol frá Bileftiliitinum frá tí tekniska í bilinum, sum hann sjálvur hevði verið við til at bygt um í Svøríki.

Bjarni Djurholm landsstýrismaður og Rúna Sivertsen formaður í Ferðslutrygd royna her bilin við ISA skipanini

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	3
Nuuk	3
Qaqortoq	6
Ammassalik	4
Saint John's	19
Halifax	16
Reykjavík	9
Seyðisfjørður	9
Tórshavn	11
Lerwick	11
Aberdeen	12
London	18
Tromsø	4
Bergen	11
Oslo	–
Stokkhólm	11
Keypmannah.	13
Helsinki	11
Moskva	14
Berlin	16
Warzawa	–
Kiev	15
Bukarest	20
Paris	16
Madrid	20
Róm	24
Malorca	27
Athen	25
Malta	26
Tunis	36
Beijing	19
New Dehli	30
Bangkok	33
Jakarta	33
Sydney	24
New York	15
Miami	–
Los Angeles	20
Meksikobýur	–
Panama	28
La Paz	16
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	21

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 983 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer eystureftir og dýpist. Tað gevur eitt skifti kaldari veður á okkara leiðum.



Lágtrýstið yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað, og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum.

JUNIOR
BUSS TAXA
KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 01/10 kl. 06⁰⁰– 02/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,3°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,5 mm – mált frá 01/10 kl. 06⁰⁰–02/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 0,5 mm

Vika 40 – 1. oktober
Vinnaratøl: **02 - 09 - 16 - 17 - 24 - 35**

Eykatøl: **23 - 43**

6 vinnaratøl:	**Eingin vinnari**
5 vinnarat.+ eykatal	**66.799,- kr.**
5 vinnaratøl:	**3.253,- kr.**
4 vinnaratøl:	**109,- kr.**
3 vinnaratøl:	**37,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

VESTFALLSKYRRINDI

28. septemb.: Mánin næstur jørðini
2. oktober: Fyrra kvarter
10. oktober: Fullmáni
14. oktober: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
3. okt	01.28	14.10	00.28	13.10	00.43	13.25	03.28	16.10	04.28	17.10	—	12.25	11.25	—	01.43	14.25	02.43	15.25	01.13	13.55	02.28	15.10
4. okt	02.53	15.20	01.53	14.20	02.08	14.35	04.53	17.20	05.53	18.20	01.08	13.35	00.08	12.35	03.08	15.35	04.08	16.35	02.38	15.05	03.53	16.20
5. okt	03.47	16.11	02.47	15.11	03.02	15.26	05.47	18.11	06.47	19.11	02.02	14.26	01.02	13.26	04.02	16.26	05.02	17.26	03.32	15.56	04.47	17.11
6. okt	04.36	16.59	03.36	15.59	03.51	16.14	06.36	18.59	07.36	19.59	02.51	15.14	01.51	14.14	04.51	17.14	05.51	18.14	04.21	16.44	05.36	17.59

5 707265 100050 >